## Ikki í Suðuroy

Í síðstu viku kom fram, at Delta Seafood hevur ilt við at fá reinskerarar til virkið í Skopun, men soleiðis ner ikki hjá virkjunum, sum felagið hevur í Suðuroy. Sambært Magnusi Jespersen, virkisleiðara tørvar felagnum kortini reinskerarar til virkið í Hvalba, men orsøkin er, at teir finnast ikki, sigur hann. Virkisleiðarin vísir á, at tað ber ikki til at taka fólk uttan av gøtuni inn at reinskera, tí arbeiðið krevur ein ávísan førleika.

## Eftir akademikarum

Tey seinastu árini hava teir donsku bankarnir havt ilt við at fáa starvsfólk við tí neyðuga førleikanum og at halda tey í arbeiði. Men nú hava bankarnir lagt á annan bógv. Í einum rættiligum átaki hava teir søkt eftir fólki við akademiskum útbúgvingum, og við at bjóða umsøkjarunum serliga góð viðurskifti hevur tiltakið borið ávøkst, sigur TV2. Tað eru serliga løgfrøðingar, búskaparfrøðingar og verkfrøðingar, sum hava áhuga.

# Eftirmeting sum hjartað í frálæruni

**Her fyri skipaði Føroya Handilsskúli fyri einum starvsfólkadegi á Hotel Føroyum. Ovast á breddanum stóð eftirmeting, og til at greiða nærri frá hesum, hevði Handilsskúlin bjóðað kenda professaranum Charles Juwah henda vegin**

EFTIRMETING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Eftirmeting má ikki verða tann parturin, sum fyllir mest, tí so køvir hann meiri enn nakað annað. Eftirmeting skal hjartað í undirvísingini, men ikki tann dominerandi parturin, sigur Charles Juwah*
*Mynd Rólant Waag Dam*

Tá Føroya Handilsskúli her fyri tók stig til at seta "eftirmeting" sum høvuðsevnið til starvsfólkadag teirra, var tað ikki tí, at tey meta at eftirmetingin á skúlanum í dag er ov vánalig. Tað er ikki teirra fatan, men tey tó sannførd um, at eftirmetingin altíð, sum alt annað, kann bøtast og gerast betri. Tað staðfesti stjórin á Føroya Handilsskúla, Reidar Nónfjall fyri Sosialinum á eftirmetingardegi skúlans.

– Tað er ikki tí, at vit halda, at vit gera eitt vánaligt eftirmetingararbeiði, men vit ynskja at gera eftirmetingina á skúlanum upp aftur betri, staðfesti stjórin á Føroya Handilsskúla.

Hann segði, at fert tú í ein rættarsal og sær grundgevingarnar fyri teimum dómum, sum verða feldir har, so er í rúgvu vís at pappírum, sum siga akkurát hvat og hvussu tingini hanga saman. Tað er tó ikki heilt í hesum banum, at tey á Føroya Handilsskúla hugsa í mun til eftirmeting, men tey vilja gjarna hava, at næmingarnir fáa grundgevingar, góðar grundgevingar, fyri tað, teir verða dømdir í.

Eisini er tað skúlans ynski, at fáa gera eftirmetingar til ein meiri natúrligan part av lærutíðini, og í hesum sambandi var tað, at Føroya Handilsskúli hevði bjóðað Charles Juwah henda vegin, og Sosialurin hitti skotska professaran til eitt prát um tankar hansara um eftirmetingar.

### Virðisleys undirvísing

– Eg haldi, at undirvísing og læra uttan eftirmetingar er virðisleyst, tí eftirmetingar geva næminginum møguleikan at vita tað, hann veit, tað hann ikki veit og tað sum hann hevur fyri neyðini at menna, heldur skotski professarin.

Charles Juwah er sannførdur um, at eftirmeting eigur at vera ein natúrligur partur av undirvísingini og frálæruni á skúlum. Hann staðfestir tó samstundis, at hetta als ikki er støðan allastaðni, men tað hevur hann í hyggju at broyta.

– Eftirmetingar vísa seg ofta at vera ein trupulleiki hjá næmingum í dag. Næmingurin ræðist eftirmeting, men hetta ynskja vit at broyta. Okkara fatan er, at eftirmeting átti at eggjað næminginum og givið honum avbjóðingar, og gjørt hann føran fyri at menna týdningarmiklar eginleikar og førleikar, staðfestir Charles Juwah, sum í hesum samanhanginum eisini trívir í enska hugtakið "lifelong learners".

– Í dag er lítil dugur í, um tú bara lærir meðan tú lesir. Vit mugu duga at læra alt lívi. Tað er ein virðismikil eginleiki í dag, sigur Charles Juwah.

### Eftirmeting valdast

Eftirmeting er týdningarmikið, men tað er minst líka týdningarmikið er, at eftirmeta rætt.

– Tað er sera ymiskt frá mentan til mentan, hvussu tey praktisera eftirmetingar. Onkrastaðni síggja vit, at eftirmetingar er tann parturin av frálæruni sum fyllir mest, men tað er heldur ikki rætt, slær skotski professarin fast.

– Eftirmeting má ikki verða tann parturin, sum fyllir mest, tí so køvir hann meiri enn nakað annað. Eftirmeting skal hjartað í undirvísingini, men ikki tann dominerandi parturin, vísir Charles Juwah á.

Tí, sigur Charles Juwah eisini, hvussu týdningarmikið og gevandi tað er, at greiða øðrum frá royndum teirra við eftirmetingum, og at hoyra onnur greiða frá sínum royndum.

– At skifta um royndir við eftirmetingar-arbeiðshættum er týdningarmikið, sigur Charles Juwah, tí soleiðis kunnu vit læra av royndunum hjá hvørjum øðrum.

### Skjóta okkum sjálvi

Skotski professarin vísir eisini á, at tað ikki bara eru næmingar, sum hava trupulleikar við eftirmetingum ella ræðast tær.

– Í dag eru tað langt frá allir lærarar, ið kenna seg tryggar við tankan um eftirmetingar. Men um vit lærarar látast sum um, at vit ikki síggja týdningin av hesum, so er tað tað sama sum, at skjóta okkum sjálvar í fótin, staðfestir Charles Juwah at enda, og sipar til, at tá er tað ikki bara næmingurin, sum missir okkurt, men eisini lærararin, og ongin fær nakrantíð at vita, um hvat kann bøtast og hvat er gott.

## FAKTA

Charles Juwah, doktari, er leiðari fyri „Útbúgving og menning" og er rektari fyri læru- og undirvísingaravdeilingina á Robert Gordon Universiteti í Aberdeen.

Umframt hetta, hevur hann ábyrgdina fyri læru- og menningarpartinum av CELT og arbeiðir hart fyri menning av starvsfólkum - bæði innanfyri undirvísing og akademi.

Charles Juwah er leiðari av útbúgvingini „Master of Arts Higher

Education Learning and Teaching" og PhD í „Educational Development". Dr.

Charles Juwah hevur granskað nógv og hevur eisini vunnið virðislønir fyri persónligari stremban.



*– Tað er ikki tí, at vit halda, at vit gera eitt vánaligt eftirmetingararbeiði, men vit ynskja at gera eftirmetingina á skúlanum upp aftur betri, sigur Reidar Nónfjall*
*Mynd: Jens Kristian Vang*